## Svimji-gull til Danmark

21 ára gamla Lotte Friis vann um vikuskiftið eitt gullheiðursmerki fyri Danmark í heimsmeistarakappinginum í svimjing. Hetta gjørdi hon, tá hon svam 800 metrar frí í heimsmeistarakappinginum í Rom, har eisini Pál Joensen hevur tikið lut. 8.15,92 var tíðin og hetta er næstskjótasta tíðin nakrantíð. Undan hesum hevði hon vunnið silvur í 1500 metrar frí. Lotte Friis hevur áður vunnið gull á sama teini, men í mun til langbanan nú, so var tað á stuttum teini tá.



## Alonso við í Liverpool-tapi

Espanyol vann 3-0 á Liverpool í venjingardysti í gjár. Liverpool hevði bæði Gerrard, Torres, Garragher og Mascherano millum teir, ið byrjaðu inni, men megnaðu kortini einki at gera við spaniólar, sum spældu sín fyrsta dyst á nýggja leikvølli sínum. Millum teirra, ið kom á vøllin fyri Liverpool, var Xabi Alonso. Hann hevur fríggjað dúgliga við Real Madrid í summar og hevur alment sagt, at hann ynskir at sleppa á sølulistan. Benitez, venjari hjá Liverpool, hevur tó ikki mist vónina um, at leikarin verður verandi, skriva bretskir miðlar í dag. Annars var danski Daniel Agger ikki við í venjingardystinum – hann er skaddur.

# Klassamunur á Toftum

B68

B36

**Greiði sigurin hjá toftamonnum á B36 í gjár var ikki eitt mál ov lítil. Tað var klassamunur á Svangaskarði, og dysturin staðfesti somuleiðis støðuna hjá feløgunum í løtuni**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Løtan, tá Bárður Mortensen, dómari, hevði floytað av, segði alt.
B68 kappast í hesum døgum um føroyameistaraheitið, meðan B36 er í niðurflytingarvanda. Ein støða, sum var óhoyrd fyri tveimum árum síðan. Nú er alt vent á høvdið.
Toftamenn mynda oddin í føroyskum fótbólti. Hvíta og svarta høvuðsstaðarfelagið stríðist fyri at sleppa undan at spæla fótbólt leygardag í 2010.




Ahmed Keita, í miðjuni, var aftur í gjár sera eyðsýndur á B68-liðnum. Hann skoraði eitt og legði upp til eitt, tá B36 vitjaði

*Savnsmynd*

### Royndu at spæla

B36 hevur verið í tungum sjógvi seinastu nógvu vikurnar. Tað hevur als ikki gingið eftir vild, og tað var aftur prógvað um vikuskiftið. Men høvuðsstaðarfelagið eigur rós fyri, at liðið framvegis roynir at spæla fótbólt. Teir vardu ikki borg og dúvaðu at fáa málleysan javnleik, men royndu at spæla við. Tað eydnaðist bara í løtum.
B68 var uppiborið á odda fyri tveimum í hálvleikinum. Toftamenn vóru ikki serliga ágangandi, men gestirnir tóktust skelkaðir av, at teir longu í fyrsta minuttinum vóru aftanfyri.
Tá heimaliðið økti til 3-0 tíðliga í seinna hálvleiki, valdi B36 at binda um heilan fingur. Mikkjal Thomassen, venjari, flutti sítt lið fleiri metrar aftur á vøllin, soleiðis, at gestirnir avmarkaðu tapið.

### Málini

B68 legði seg á odda longu í fyrsta minuttinum. Ahmed Keita slapp leysur av trimum mótstøðumonnum og sendi bóltin dygst framvið stólpanum.
Toftamenn øktu um leiðsluna trýggjar minuttir undan hvíldini. Øssur Hansen legði bóltin fyri føturnar á Poul N. Poulsen, sum royndi seg. Herbert í Lon Jacobsen vardi fyri skotroyndini, áðrenn Pól Jóhannus Justinussen var á bóltinum og smekkaði hann í netið handan Jóan Paula Dahl Jakobsen.
Nenad Stankovic skoraði til 3-0, tá seinni hálvleikur var níggju minuttir gamalur. Serbiski miðvallarin hevði ikki stórvegis trupulleikar at senda í málið, eftir frálíkt gjøgnumbrot frá Ahmed Keita í høgru. Hetta var fyrsta málið hjá Stankovic, síðan hann skifti til B68 frá NSÍ í vetur.

### Í niðurflytingarvanda

B36 er í niðurflytingarvanda í hesum døgum. Liðið er trý stig burtur frá niðurflyting í løtuni. Og fjepparar óttast.
Hópurin hevur í hesum kappingarárinum vart seg við at siga, at liðið hevur ungt og óroynt. Útsagnir, sum ikki eru haldbarar longur. Hóast Dennis Holmberg, André Riel og Christian R. Mouritsen framvegis eru ungir í fótbóltshøpi, eiga teir at vera eyðsýndir í føroysku landskappingini. Klæmint Matras, Jákup á Borg, Herbert í Lon Jacobsen og Odmar Færø hava seinnu árini prógvað sína støðu í føroyskum fótbólti. Somuleiðis við Bergi Midjord og Róaldi Jacobsen.
Talan er um eitt lið, sum í øllum førum ikki eigur at vera í niðurflytingarvanda. Greiðu tapini fyri NSÍ og B68 staðfesta, at B36 er í trupulleikum. Og tað verður væntað, at KÍ fer at vinna nógv stig afturat.

### Tikið øll á bóli

Bill M. Jacobsen, venjari hjá B68, hevur seinastu tvey árini verið høgt í metum í føroyskum fótbólti. Saman við Heðini Askham hevur hann staðið á odda fyri U21-landsliðnum, sum hevur fingið fleiri frálík úrslit. Og seinastu mánaðirnar hevur hann staðið fyri mest óvæntaða úrslitinum í landskappingini higartil – B68.
Liðið er í løtuni besta boðið á ein avbjóðara um gullmerki, sum HB hevur kós ímóti. Toftamenn hava ikki tapt í seinastu 12 royndunum, og hóast fleiri at hug at bíða eftir, at liðið missir fótafetið í oddastríðnum, er ikki líkt til, at tað hendir. Í gjár var klassamunur, tá B36 vitjaði. Men mikudagin skal B68 av álvara standa royndina, tá Víkingur vitjar.
Rós til Bill M. Jacobsen og toftamenn!

## Dreingir móti monnum

Mikkjal Thomassen, venjari hjá B36, staðfesti eftir dystin, at støðan er lítið hugalig í høvuðsstaðarfelagnum í løtuni. Men hann er framvegis bjartskygdur.
- Vit verða bukaðir av í dag. B68 spælur væl, og sigurin er fult uppiborin. Vit hava ikki dirvið at leypa inn í nærdystirnar. Tað vóru dreingir móti monnum í dag.
Toftamenn eiga rós fyri sítt avrik, sigur B36-venjarin. Hann greiðir frá, at gestirnir fingu ein skelk frá byrjan.
- Vit koma afturum alt fyri eitt, og tá verður tað torført. Vit royna at trýsta eftir hvíldina, men tá B68 økir um leiðsluna eftir verjumistak frá okkum, velja vit bara at verja restina av dystinum, sigur Mikkjal Thomassen, venjari hjá B36.

## Hugsaðu um komandi uppgávurnar

Bill M. Jacobsen var sjálvsagt sera væl nøgdur eftir dystin á Toftum í gjár.
- Tá tú leggur teg á odda tíðliga í dystinum, verður liðið automatiskt vanliga flutt longur aftur á vøllin. Tað royndu vit ikki at gera, og tað eydnaðist. Vit høvdu møguleikar at skjóta fleiri enn trý mál, men vit eru sera væl nøgdir í dag, sigur Bill M. Jacobsen, venjari hjá B68.
Tá tit økja til 3-0, hugsar tit tá um komandi uppgávurnar?
- Vit hava dyst mikudagin og aftur sunnudagin. So tá royna vit at hvíla eitt sindur. Vit eru væl fyri í løtuni, og arbeiða miðvíst. Vit eru til reiðar til restina av kappingarárinum, sigur venjarin hjá toftamonnum.